

www.oljan.fo

**Jan Müller** 13 - 02 - 2013

# Hoydalsnæmingar fjórðbestir at finna olju í London

Jógvan Mellemgaard, Jóna Danielsen, Bergur Djurhuus og lærari teirra Búgvi Poulsen frá Føroya Studentaskúla og HF-skeiði umboðaðu Føroyar og gjørdust nummar 4 av 7 londum í PetroChallenge finaluni, sum var á Imperial College London leygardagin 26. januar í ár. Kanada vann hesaferð. Teir 7 bólkarnir, sum luttóku, høvdu allir vunnið PetroChallenge 2012 í heimlandinum og umboðaðu ávikavist Grønland, Ísland, Føroyar, Bretland, Danmark, Noreg og so Kanada, sum var við fyri fyrstu ferð. Samanlagt kappaðust næstan fýra túsund miðnámsskúlanæmingar í hesum londum um at koma í finaluna. Kappingin var sera tøtt millum teir sjey finalubólkarnar. Grønland byrjaði best og legði seg á odda við hægsta virði og flestu trúvirðisstigum. Tá kappingin var hálvliðin, gjørdi Kanada nøkur stór fund og kom á annað pláss, og við góðum útgreiningum og væl valdum boringum, struku teir framvið Grønlandi. Hinir bólkarnir gjørdu eisini nøkur góð fund, og tá tað nærkaðist endanum, var um reppið, at Danmark vann Kanada aftur. Føroyski bólkurin var eisini væl við, men at enda eydnaðist bretska bólkinum at vinna triðja plássið, eitt borihøvd framman fyri føroyska bólkin. Endaliga støðan gjørdist - Kanada. Brennan Waters, Josh Watts, Oli Isaac, Jamil Kara Dev Facey High School (International Petroleum Group) $17,6 milliardir í virði Danmark. Jakob Juul Nielsen, Rasmus Peter Riber, Jonas Erichsen Rybners Gymnasium (Oil Hunks) $15,6 milliardir í virði Bretland. Ross Yule, Samantha Michell, Charlie Innes, Hannah Robertson Bucksburn Academy (Oil Me Up) $12,1 milliardir í virði Føroyar. Jogvan Mellemgaard, Jona Danielsen, Bergur Djurhuus Føroya Studentaskúli og HF-skeið (Oljusjeikarnir) $11,9 milliardir í virði Noreg. Tarjei Vefring Stordal, Thea Emily Abney, Mathilde Melsom St Olav Videregaende Skole (Eco Oil) $9,7 milliardir í virði Grønland. Daniel Rasmussen, Angunnguaq Boassen, Frederik Siegstad Sanaartornermik

Ilinniarfik (Black Gold Diggers) $8,0 milliardir í virði Ísland. Sigurjón Sigurjónsson, Sæþór Sigmarsson, Ævar Kristinsson, Jón Guðjónsson Framhaldsskólinn í Vestmannaeyjum (The Charlies) $4,0 milliardir í virði Hetta var 11. árið á rað, at føroyska felagið Simprentis skipaði fyri PetroChallenge fyri miðnámsskúlum. Í 2002 vóru einans føroyskir skúlar við, og tá vunnu Hallur Joensen, Rói Jacobsen og Gunnleivur Biskopstø av Tekniska skúla í Klaksvík. Síðani 2003 hevur verið kappast við bólkar úr øðrum londum. Vinnarar síðani 2003 hava verið - 2003 Føroyar 2004 Bretland 2005 Føroyar 2006 Danmark 2007 Bretland 2008 Ísland 2009 Ísland / Noreg 2010 Danmark 2011 Danmark 2012 Kanada Í 2003 vunnu Marner Joensen, Markus H. Sørensen og Poul Ingi Olsen av Tekniska Skúla Klaksvík, og í 2005 vunnu Doris í Garði Joensen, Ragnhild P. Kjærbo, Kristian Kristiansen av Føroya Handilsskúla Kambsdali. Føroyskir miðnámsskúlar hava luttikið í finalunum øll árini undantikið 2011. Statoil stuðlaði PetroChallenge Føroyar 2012 og tí eisini føroysku luttøkuni í altjóða finaluni. Simprentis og FOÍB skipaðu fyri.